

www.oljan.fo

**Jan Müller** 30 - 05 - 2013

# Amerikonsku oljugoymslurnar metstórar

Seinasta fríggjadag hevði ein av heimsins størstu forbrúkarum av olju, USA nærum 400 milliónir tunnur av olju í handilsligu goymslum sínum. Hetta vísa tøl frá EIA, sum er amerikanska orkuumsitingin, sambært heimasíðuni E24.no. So nógv hevur USA ikki havt á goymslum sínum, síðani EIA fór undir at gera hagtøl í 1978. Haraftrat koma nærum 700 milliónir tunnur, sum USA hevur liggjandi í sínum strategisku goymslum til at brúka undir kreppum ella tá myndugleikarnir vilja hava lægri oljuprísir. Bara í seinastu viku vuksu goymslurnar við trimum milliónum tunnum. Tað var munandi meira enn tær 1,5 milliónir tunnur, sum greinarar høvdu roknað við frammanundan. Tíðindini frá EIA siga, at USA verður framhaldandi minni bundið av innfluttari olju. Orsøkin er minni búskaparligur vøkstur eins og at amerikanska orkuframleiðslan veksur. Tær seinastu fýra vikurnar hevur USA innflutt í meðal 7,8 tunnur um dagin. Tað er ein minking uppá 1,1 millión tunnur ella 12,4% í mun til sama tíðarskeið í fjør. Orkustøðan í heiminum er annars við at broytast í stórum. Lond sum USA og Kanada eru við at gerast heilt óheft at innfluttari olju og gassi. Orsøkin er serstakliga tann, at londini eru farin at útvinna olju og gass úr skiferløgum í undirgrundini. Um somu tíð eru so lond í Asia farin at keypa meira olju og gass úr Miðeystri.